# Stuttligt at súkkla til

**Sama dag sum stóra og harða súkklukappingin »Tour de France« byrjaði, løgdu tey bæði Johan og Gunva Djurholm á ta longu ferðina úr Hoyvík og vestur til Vatnsoyrar. – Hetta var ein fínur túrur, siga tey bæði við ein munn**





*Johan og Gunva Djurholm dáma væl at súkkla – bæði eftir sløttum og uppi millum fjalla*

## Súkkling




Snorri Bend
snorri@sosialurin.fo


Hoyvík/Vatnsoyrar: 48 kilometrar! Hesin var teinurin, sum systkini bæði høvdu sett sær fyri at súkkla henda leygardagin, 5. juli saman við foreldrum sínum.

– Vit ynsktu at fara ein súkklutúr, og at gera okkurt sum var eitt sindur krevjandi, greiðir mamma teirra, Durita Djurholm frá.

Samstundis var talan um ein túr, har ein kundi eygleiða vakurleikan í føroysku náttúruni og verða í nánd av føroysku fjøllunum.

Góður møguleiki er fyri hesum, tá ein súkklar á Oyggjarvegnum og kann hyggja yvir bæði firðir og sund.

– Og so er tað eisini stuttligt, tá ein aftaná kann siga, at "Yes, vit kláraðu ein so langan súkklutúr!", sigur mamman.

Komin vestur til Vatnsoyrar fóru tey á tjaldtúr við Bøsdalafoss, og vitjaðu eisini á Zarepta, har fólk úr samkomu teirra, Lívdini í Hoyvík vóru og vaskaðu.

### Strævin brekka

Fyrr í mánaðinum skrivaðu vit um tann skjótt 81 ára gamla Martin Joensen úr Havn sum eisini dámar væl at súkkla.

Sosialurin hitti Martin ein dagin, hann var á súkkluferð úr Havn til Hellurnar. Eitt 90 kilometrar langt strekki, sum hann súkklaði eftir 12 tímum.

Johan og Gunvá Djurholm dáma eisini væl at súkkla, og henda leygardagin høvdu tey bíðað spent eftir: Veðrið var til vildar, og nú skuldu tey út á ta longu ferðina til heimbygdina hjá móður teirra.

Lagt varð til brots eftir Oyggjarvegnum, gjøgnum Kollfjarðardal og Vágatunnilin, og síðani tað seinasta pettið til Vatnsoyrar.

– Túrurin var fínur, men tað strævnasta pettið á túrinum var at koma frá undirsjóvartunlinum og niðan gjøgnum brekkuna móti Sandavági, eru bæði Johan og Gunva samd um.

Túrurin vardi íalt í slakar fimm